

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Pedagogur til Dagstovnin Sólareygað

Søkt verður eftir einum **pedagogi,** til stovu við blandaðum aldursbólki, at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum Sólareygað, Sundsvegur 23, 100 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 30. oktober 2008.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mirjam Johannesen, stovnsleiðara, telefon 30 24 30 ella 28 71 50.

Tórshavnar kommuna

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Endurlýsing eftir pedagogum til Bústovnin í Børkugøtu 1

Søkt verður eftir 2 pedagogum til Bústovnin Børkugøta 1 til setan skjótast tilber ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstørv. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og talan er um at arbeiða dag-, kvøld-, døgn-, vikuskifti og serstakar frídagar.

Á bústovninum búgva 6 menningartarnað vaksin fólk, og fleiri teirra hava likamlig brek. Endamálið er m.a. at bjóða teimun góðar og tryggar menningarkarmar. Tað pedagogiska arbeiði í gerandisdegnum verður tilrættalagt efti tørvinum hjá tí einstaka.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jónu Olsen, settan leiðara á tlf. 511442.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedgogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.
Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni Børkugøta 1.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V.skal sendast til.

Bústovnurin í Børkugøtu 1
100 Tórshavn
Stílað: Jóna Olsen, settur leiðari

**Umsóknarfreist: 3. november 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 360000, Faks 360001, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

## Havnar Badminton Felag – 50 ár



Í samband við 50 ára hátíðardagin hjá HBF, fer felagið at skipa fyri einari stórari framsýning.

Nevndini tørvar tískil gamlar myndir, lutir, ketsjarar, búmerkið, nálir, troyggjur ella eitt-hvørt annað, sum kann verða við til at lýsa søguna hjá HBF, frá byrjanini í 1958, til tíðina í høllini á Hálsi og til umvælingina av gamla svimjihylinum til badmintonhøll.

Lutir kunnu latast inn í handlinum **hjá Kirstin Hansen, Wrangler Shop, Niels Finsensgøta 23.**

**Upplatingartíðir**
mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.30
Leygardag kl.10-14.

Hátíðardagurin verður hildin **15. november.** Tá verður skipað fyri tiltøkum, framsýning og veitslu á Hotel Hafnia.

Sí heimasíðu www.hbf.fo fyri at fáa nærri upplýsingar.

Vegna nevndina
**Bjørg Djurhuus,** tlf. 215490
**Helena Skaalum Mikkelsen,** tlf. 250053
**Marjun Niclasen,** tlf. 224086

Lesið Sosialin -so eru tit við!